# Berlin – nýggi miðdepilin í Týsklandi og Europa

**Konan og eg vóru á áhugaverdari ferð í Berlin í summar. Leiðin er ikki long at ferðast úr Hantsholm við bili suður gjøgnum Jútland og longur suður gjøgnum fyrrverandi donsku greivadømini Slesvík – Holstein fyri síðani at snara eystur yvir við beinleiðis kós móti Berlin, høvuðsstaði Týsklands, hagar vit komu 29. juni í góðveðrinum, sum har valdaði**



Unter den Linden við Brandenburger Tor í baksýni

## Ferðafrásøgn



**Johan Samuelsen**

Ongin europeiskur høvuðsstaður í stóru londunum fyri sunnan hevur havt eina so umskiftiliga støðu í søguni sum Berlin. Hesin býur, sum fyrstu ferð verður nevndur við navninum Berlin í 1243, byrjaði sum ferjustað á oydnu ongunum við ánna Spree, men fór ikki rættuliga at vaksa fyrrenn Hohenzollarnir blivu útnevndir til kurfúrstar, í greivaskapinum Brandenburg, og gjørdu Berlin til høvuðssæti sítt. Hohenzollarnir sótu við valdinum í Berlin líka fram til endan av 1. veraldarbardaga undir nøvnum sum kongaríkið Preussen og Týska keisararíkið. Eftir fyrra kríggj fingu vit so Weimarrepublikkina, og varð hon jarðløgd av nazistunum í 1933, sum sótu við valdinum í Berlin til maj 1945, tá eisini Hitler viðgekk endaliga ósigurin í 2. veraldarbardaga. Og eftir tað endaði eystari parturin av Berlin sum høvuðsstaður í DDR til 1990. Og síðani 3.okt. 1990 er Berlin so aftur vorðin endurreisti høvuðsstaður fyri samlaða Týskland, hóast býarmyndin enn er nógv merkt av sundurskiljanini hesi 45 árini millum Eystur- og Vesturberlin.

### Unter den Linden

Vit bæði hava verið í Berlin áður, tá nógv hataði múrurin, enn býtti henda býin í tveir partar. Tað vanliga hjá fólki, sum vitjaðu Vesturberlin tá, var at búgva vestarumegin múrin, og so gera eitt rend eysturum (handan múrin var so óunniligt og keðiligt at vera!), og tað gjørdu vit eisini tá, men nú ongin múrur er, so høvdu vit avgjørt, at hesaferð skuldi vit búgva í gamla Eysturberlin og uppliva og síggja, hvussu har var nú – og so varð gjørt. Og fingu vit innivist á sjálvum Alexanderplatz, sum er uppkallað av keisari Wilhelm fyrsta eftir russiska zarinum Alexanduri, sum vitjaði Berlin í 1805. Og sum er partur av tí, sum týskarar í dag nevna "Mitte" í hjartanum í Berlin. Og hetta val angraðu vit á ongan hátt. Har kendist alt fyri eitt, sum hetta var sanna, gamla, hábærsliga Berlin, har vítt var til veggja og alt andaði av søguni. "Mitte" er vaknað aftur til lívs. Breiða og stolta høvuðsgøtan, "Unter den Linden" sum í áravís hevði ligið og sovið sín tornurósusvøvn, tí kommunisman deils ikki loyvdi einum frælsum og livandi mentunar- og handilslívi, og deils, tí høvuðsgøtan var kvett av um tvøran av ólukku Múrinum, hon er so sanniliga vaknað upp til nýtt lív! Og hevur aftur vunnið sína gomlu hevd, sum gøtan fram um allar aðrar í Berlin. Har yður av spennandi metunartiltøkum á sera høgum støði, og Berlin er vorðin mentunarhøvuðsstaðurin í Europa, har listafólk úr øllum heiminum seta hvørjum øðrum stevnu. Fyri at nevna okkurt, sum liggur á seinasta ½ kilometrinum, áðrenn tú kemur til vartekni hjá býnum, Brandenburger Tor, so kunnu vit nevna Deutsche Staatsoper Unter den Linden, Berliner Ensemble, Guggenheim, Humboldt universiteti o.o., umframt ein hóp av lættara slagnum av variteum, kabarettum, o.s.fr., umframt eitt ótal av matstovum, listhandlum, keypsskálum (størsta handilshús í Europa, KaDeWe er at finna har á leiðini!) søvnum, biografum o.s.fr. Og so er eisini bíligt at handla í Berlin, ein 20 – 25% bíligari enn her heima!

### Hanna við ánna Spree og dómkirkjuna

Og so dómkirkjan, sjálvandi, eisini í Mitte í Berlin, og beint yvirav henni stóð gamla kongsborgin hjá proysisku kongunum illa farin av krígsávum, og tað sum eftir var, varð javnað við jørðina, eftir at tann parturin av Berlin var vorðin høvuðsstaður í kommunistiska DDR, og kommunistiska stýrið bygdi í staðin tað sokallaða parlamentið hjá Honecker og co., "Volkskammer" nevnt, á, hvat heldur tú, kæri lesari, kongaligu grundini – og boðaði harvið frá "nýggjum" tíðum við kommunistiskum "kongi"! Men hetta "Volkskammer", (við bara tí eina flokkinum!), fekk ein bráðan enda, tá Múrurin fall, og sama er hent við hesum nógv hataða tinghúsi, sum eisini er ruddað og javnað við jørðina – og talan er so sanniliga um at endurreisa kongsborgina á hesum prýðiliga staði fram við Spreeánni! So skifta tíðir!

### Endurreisti høvuðsstaðurin

Allur miðbýurin við hesum stásiligu bygningunum, kirkjunum, søvnunum, universitetum, tjóðleikhúsunum, Ríkisdegnum, o.s.fr. eru allir sum ein, endur-